## Kvinnur vilja lesa verkfrøði

Triðja árið á rað hækkar talið av kvinnum, sum vilja lesa verkfrøði í Danmark. Tí standa kvinnurnar nú fyri 26,5 prosent av teimum, sum lesa verkfrøði. - Hetta er tað hægsta talið, vit nakrantíð hava havt, so tað er gott. Men tað er enn ikki nóg gott, tí best hevði verið, um talið var helvt um helvt, sigur Helle Petersen, forkvinna í Ingeniørforeningens Kvindeudvalg, við blaðið Ingeniøren. Hon heldur, at økingin av kvinnum er avleiðing av eini hugburðsbroyting, har tað í størri mun verður góðtikið, at kvinnur lesa mannfólkafak.



## Kanning um gjalding

Í samband við at Intrum Føroyar hevur gjørt kanningina, gjaldsindex 2007, bjóðar fyritøkan til temadag á Hafnia komandi fríggjadag. Stefan Schar, sum hevur ábyrgd av Gjaldsindex í fleiri enn 20 londum í Evropu, fer at framleggja og greiða frá úrslitinum av kanningini. Umframt tað er nógvar aðrar framløgur. Millum annað fer landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Magni Laksáfoss, at hugleiða um hvørja ávirkan gjaldsmynstrið hevur á føroyska samfelagsbúskapin. Harafturat vera umboð fyri peningastovnar, advokatvirki og aðrar fyritøkur.

# Føroya Pride av á hesum sinni




*Nógv fólk gingu skrúðgongu seinnapartin leygardagin*
*Mynd: Ólavur Fredriksen*

**Um vikuskiftið hevur høvuðsstaðurin verið prýddur í øllum ælaboganslitum, nú vitjandi úr øllum Norðanlondum hava hátíðarhildið Føroya Pride – festivalurin fyri samkynd, tvíkynd og transkynd**

MENTAN

*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Føroya Pride, sum byrjaði fríggjadagin, endaði seinnapartin sunnudagin. Á skránni hesar dagarnar hava fyrilestrar, pallborðsfundur, filmar, skrúðgonga, røður og sangur.

Mest sjónliga og mest vitjaða tiltakið var seinnapartin leygardagin, tá skipað var fyri skrúðgongu frá Norðurlandahúsinum og oman í býin, har fólk savnaðust til røðu og felagssang á Vaglinum.

Hetta er onnur ferðin at skipað verður fyri Føroya Pride í Føroyum. Fyrstu ferð var tað í 2005, tá Bogin (t.e. felagsskapurin hjá føroyskum lesandi og ungum samkyndum) stóð fyri tiltakinum. Í ár var tað so felagsskapurin ANSO, sum saman við Friðarboganum, ið skipaði fyri Føroya Pride. ANSO er norðurlendskur felagsskapur, ið ið arbeiðir við áhugamálunum hjá samkyndum, tvíkyndum og transkyndum lesandi í øllum norðurlondum.

**Nógv meira um Føroya Pride í blaðnum týsdagin**